# Bretska luttøkan í Irak kannast

Í síðsta mánað gjørdi bretski forsætisráðharrin, Gordon Brown, av at kanna bretsku luttøkuna krígnum í Irak, og í gjár byrjaði kanningin. Hon fer í stóran mun at snúgva seg um sjálva avgerðina hjá táverandi forsætisráðharranum, Tony Blair, at taka lut í innrásini í Irak. Blair hevur sagt, at hann er sinnaður at samstarva við kanningarnevndina, men politiskir eygleiðarar halda, at hann er alt annað enn fegin um, at avgerð hansara verður kannað. Tey, sum vóru ímóti bretsku innrásini í Irak, vóna nú, at kanningararbeiðið fer at avdúka, at fregnartænastufrágreiðingar um Irak blivu broyttar, so tær kundu rættvísgera eina uppgerð við stýrið hjá Saddam Hussein.



# Óttast víðgongda islamismu

Forsetarnir í Afghanistan, Pakistan og Tadjikistan samdust í gjár um at samskipa tilsøkl, sum skulu forða fyri, at víðgongdir islamistar fáa ov stóra ávirkan í londunum í Miðasia. Sum er gera islamistarnir nógv um seg í Pakistan og Afghanistan, og sambært forsetunum er vandi fyri, at ágangurin kann breiða seg til onnur lond í økinum. Aftan á fundin hittu teir tríggir forsetarnir russiska forsetan, Dmitrij Medvedev, sum hevur sagt, at land hansara vil fegið hava ein meiri virknan leiklut í Afghanistan. Eins og Vesturheimurin ber Russland ótta fyri, at ágangurin hjá islamistunum skal breiða seg um eitt størri øki í Miðasia.

# 180.000 krónur í frítíðarløn

**Jógvan Arge hevur verið uppsagdur í Kringvarpinum í seks mánaðir. Fram til í dag, hevur hann fingið umleið 30.000 krónur um mánaðin í uppsagnarløn. Men nú gjørdist talan í prinsippinum um eina feriu, tí frá í gjár, var Jógvan Arge aftur í føstum starvi í Kringvarpinum**

UPPSØGN
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

- Í meira enn hálva øld hevur Argenavnið verið óloysiliga knýtt at útvarpinum. Hetta er nú søga, eftir at Jógvan Arge, sum í 40 ár hevur verið ímyndin av føroyskum útvarpi er sagdur úr starvi saman við sjey øðrum starvs feløgum. - Síðsta orðið er ikki sagt, sigur Jógvan Arge.

Hetta stóð skrivað á forsíðuni á Sosialinum 16. desember í fjør, tá tað kom fram, at Jógvan Arge saman við sjey øðrum varð uppsagdur í Kringvarpi Føroya.

Síðani tá er ymiskt hent í málinum, og í gjár kom staðfestingin, at seinasta orðið ikki var sagt, og uppsøgnin hjá Jógvani Arge er nú ógildað av Mentamálaráðnum.



Sosialurin
Nr. 242 • Týsdagur • 16. desember 2008 • 82. árg. • Kr. 20,00
SHEFA verpir gullegg til Føroyar
Vinnan 23-34
130 fólk mist arbeiði í Klaksvík
Síða 42
Stóratjørn í vanda
Síða 7
Nýggjur skúli við Løkin
Síða 8
JÓGVAN ARGE FINGIÐ SEKKIN
í meira enn hálva øld hevur Arge-navnið verið óloysiliga knýtt at útvarpinum. Hetta er nú søga, eftir at Jógvan Arge, sum í 40 ár hevur verið ímyndin av føroyskum útvarpi er sagdur úr starvi saman við sjey øðrum starvsfeløgum. - Síðsta orðið er tó ikki sagt, sigur Jógvan Arge
www.glitnir.org
JÓLAGÁVU

*Soleiðis sá forsíðan á Sosialinum út 16. desembur 2008. Nú er veruleikin broyttur, og Jógvan Arge er ikki longur sekkjaður*

## Nógva uppsagnarløn

Síðan Jógvan Arge varð uppsagdur, hevur hann starvast fyri aðra rás, samstundis, sum hann hevur fingið uppsagnarløn frá Kringvarpinum. Sum sær út nú, er talan blivin um eitt slag av frítíðarløn hesar seinastu seks mánaðirnar, tí nú er Jógvan Arge aftur fastsettur í Kringvarpinum.

Sjálvur veit høvuðspersónurin ikki, hvat nú hendir.

- Eg havi ikki verið í samband við leiðsluna, so nú mugu vit bara síggja, hvat hendir. Sum nú er dugi eg illa at siga, hvat fer at henda, sigur Jógvan Arge.

## Ivast í endurgjaldi

Hinvegin veit Jógvan Arge, sambært heimasíðuni hjá Kringvarpinum, ikki, um hann fer at krevja endurgjald frá arbeiðsgevara sínum, nú tað er staðfest, at hann varð uppsagdur av órøttum.

Útvarpsmaðurin segði eisini við heimasíðuna hjá Kringvarpinum í gjár, at hann fegnast, at niðurstøðan hjá Mentamálaráðnum er tann sama, sum hjá honum sjálvum.

## Ósaklig uppsøgn

- Mentamálaráðið hevur í kæruviðgerðini kannað eftir, hvørt mannagongdin í sambandi við uppsøgnina hevur verið røtt, harundir hoyringar- og uppsagnarfreist, og um Kringvarp Føroya hevur tikið saklig atlit, tá ið avgerð varð tikin um at siga starvsfólkið úr starvi. Ongin ábending er í skjølunum í málinum, um at onnur grund enn sparing er orsøk til, at starvsfólkið er sagt úr starvi, men sparingin hevði verið størri, um starvsfólkið hevði fingið tilboð um starvið sum journalistur, sum varð lýst leyst stutt undan uppsagnartilgongdini. Harumframt er týðandi málsviðgerðarfeilur gjørdur, sigur Mentamálaráðið í niðurstøðuni.

Tí leggur Mentamálaráðið upp til, at Kringvarp Føroya og Jógvan Arge finna eina loysn á málinum.

Hvørki Rúni Heinesen, stýrisformaður í Kringvarpinum, ella Annika Mittún Jacobsen, kringvarpsstjóri, hava verið at fáa fatur á í dag, men við heimasíðuna hjá Kringvarpinum hava bæði greitt frá, at tey ikki hava viðmerkingar til málið.

## Seks uppsagnir staðfestar

Jógvan Arge er nú aftur formliga í føstum starvi í Kringvarpinum, eftir at hann kærdi arbeiðsgevara sín, sum segði hann upp. Men soleiðis er støðan ikki hjá hinum seks fólkunum, sum eisini mettu, at tey vórðu uppsøgd av órøttum.

- Ongin ábending er í skjølunum í málunum, um at onnur grund enn sparing er orsøk til, at starvsfólkini eru søgd úr starvi á stovninum, sigur Mentamálaráðið um uppsagnirnar.

Hetta merkir, at hesi fólkini nú endaliga eru uppsøgd.

Sum grundgevingar fyri kæruni vístu hesi seks fólkini á, at nógvir skeivleikar vóru í uppsagnartilgongdini, og so kærdu tey eisini leiðsluna í Kringvarpinum fyri handfaringina uppsagnunum.

Mentamálaráðið metir, at Kringvarpið hevur gjørt onkur mistøk í tilgongdini, men av tí, at kringvarpið sambært siðvenju hevur rættiliga fríar ræsur at velja, hvørji fólk skulu starvast har, so verða hesar uppsagnir ikki ógildaðar.